*Vitjaðu løgmann í Tinganesi í vikuni:*

# Maersk leggur nú til brots í Føroyum

*Danska oljufelagið Maersk Olie og Gas, sum higartil ikki hevur víst nógvan áhuga fyri føroysku undirgrundini, vil nú vera við í leitingini eftir olju og gassi við Føroyar. Í vikuni vitjaðu umboð fyri Maersk og trý onnur oljufeløg løgmann og oljuumsiting*



Jan Muller

Mangt bendir á, at stóra danska AP Møller fyritøkan av álvara er farin at vísa føroysku undirgrundini ans. Hertil fór eitt av mongu feløgunum í AP Møller-samtakinum, »Maersk Contractors« undir at bora í Lopra. Leiðslan í fyritøkuni vónaði, at hetta bert fór at vera fyrsta uppgávan í Føroyum og at her fóru at vera aðrar uppgávur í framtíðini eisini.

Nú er eitt annað av feløgunum í samtakinum, nevniliga »Maersk Olie og Gas«, sum stendur fyri leiting og boring eftir olju nógva staðni í heiminum, farið at vísa føroyska økinum ans - so stóran, at umboð fyri felagið við varastjóranum Bo Wildfang á odda saman við umboðum fyri trý onnur oljufeløg, sum Maersk hevur tikið upp samarbeiði við á Føroyaøkinum, vitjaðu løgmann í Tinganesi í vikuni.

Á fundinum við løgmann greiddu umboð fyri tey fýra oljufeløgini frá ætlanum teirra á føroyska økinum. Tey fýra feløgini, sum hava tikið seg saman í eitt samtak, sum skal arbeiða við Føroyaøkinum eru umframt Maersk, tað belgiska oljufelagið FINA, tað bretska Deminex og tað amerikanska Union Texas Oil.

Fina er operatørur. Bæði Fina og Deminex eru við í Lopransboringini.

*Umboð fyri tey fýra oljufeløgini uttan fyri Hotel Føroyar. Mynd: Kalmar*

Umframt at vitja løgmann, nýttu tey fýra feløgini eisini høvi til at hitta umboð fyri oljufyrisiting og Oljuráðleggingarnevnd.

Sosialurin hevur fleiri ferðir hesi seinastu árini fregnast hjá danska oljufelagnum Maersk Olie og Gas og spurt, hví fyritøkan ikki hevur víst føroysku undirgrundini ans, nú so mong onnur oljufeløg hava áhuga fyri økinum. Svarið hevur verið, at Maersk fylgir gongdini í Føroyum, men hevur ikki hildið tað vera nóg áhugavert at luttaka í forkanning og leiting.

Nú varastjórin í felagnum, Bo Wildfang fyri fyrstu ferð vitjar í Føroyum spurdu vit hann, hvussu tað ber til, at Maersk Olie og Gas nú bráddliga er farið at vísa føroysku undirgrundini ans?



*Mærsk Olje og Gas hevur fleiri boripallar í Norðsjónum*



MCAFEE® Anti-Virus

McAfee VirusScan er sera lætt at nýta. VirusScan finnur og burturbeinur kend og nyggj telduvirus áðrenn tey gera um seg. VirusScan verður javnan endurnýggja og fæst til DOS, Windows og OS/2

Vit senda um alt landið. Prísir frá kr. 487,- (v/mvg)

Adaptive Design, 690 Oyndarfjørður. Tlf.44872, Fax.44873

Vit hava ALT til BAÐIRÚMIÐ

– t.d. stórt úrval av baðirúmsskápum frá HAFA



»Silvia«: B 70 / H 53,5 / D 15

RØTTU PRÍSIR & BESTA DYGD

Øll við spegilshurðum uttan/innan og í erváljósinum, sum fæst til øll skápini, 110/220 V við jørð.

*Vitjið framsýning okkara á Hálsi ella ringið og fáið tilfar sendandi*

Svend Krosstein
Falkavegur - Tlf. 14600

VHS
Alt tilfar til
VATN
HITAVERK
SANITET

